# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»Tað er áður sæð, at eitt venjaraskifti kann sparka nýtt lív í ein hóp, og helst er tað hesi effektini, sum leitað verður eftir í Vági«*

*Sosialurin*

# Á Mølini verður spælt um seks stig

**Oddaliðið tekur á Mølini á Eiði í móti HB, og vinna teir verður stigamunurin teirra millum átta stig. Verður tað hinvegin HB, sum fer við øllum, eru bara tvey stig á muni, so á Eiði verður spælt um seks stig leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Næsta vikuskiftið á rað hevur EB/Streymur ein seks-stiga dyst. Við verandi leiðslu í huga, hevur oddaliðið nú møguleika at seta enn av kappingarneytunum púrasta til viks í endaspurtinum*

EB/Streymur og HB hava spælt tvær ferðir í móti hvørjum øðrum í ár, men leygardagin verður fyrsta ferðin, at HB vitjar á Eiði.

Fyrri dysturin í Gundadali endaði við 3-2 sigri til EB/Streym og seinni við 2-2 javnleiki. Hesaferð vil HB gera alt hvat teir eru mentir, fyri at fáa so nógv stig sum gjørligt við av Mølini.

Reint manningarliga er heldur ongin forðing fyri, at hetta skal lata seg gera. HB hevur allar mans tøkar til týdningarmikla dystin, sum er ógvuliga avgerandi fyri restina av kappingarárinum hjá HB.

Vinna teir eru teir ikki meiri enn tvey stig aftanfyri EB/Streym, men tapa teir eru heili átta stig upp til oddaliðið.

Eftir trivaliga sigurin í Klaksvík er lagið gott í Sundalagnum. Tey harmast tó um, at liðformaðurin, Egil á Bø, ikki fær verið við. Leygardagin í Klaksvík fekk hann sítt fimta gula kort í ár, og tí verður hann noyddur at sita yvir móti HB.

Nýggi maðurin hjá EB/Streymi, Jørgen Meitilberg, fekk sína debut í Klaksvík, men honum verður heldur ikki roknað við til dystin í morgin. Hóskvøldið fekk hann skaða undir venjing og var noyddur at gevast, so hann er ógvuliga ivasamur.

Harafturímóti er Arnbjørn komin fyri seg eftir skaðan hann fekk í fótin, tá hann varð ákoyrdur av einum trukki í farnu viku, og tað er nakað tey fegnast um í Sundalagnum.

Fyri summarsteðgin og áðrenn skaðan, var Arnbjørn sera væl fyri og skoraði fleiri mál. Og av Eiði og suður til Kollafjørð vóna tey nú, at Arnbjørn saman við restini av vælkoyrandi EB/Streymunum kann tryggja felagnum 12. sigurin í ár.

## Jónhard á landsliðnum

Andrew av Fløtum noyddist í gjár at geva Jógvani Martin Olsen avboð til landsdystin móti Georgia. Andrew hevur drigist við ein skaða, og tí hevur hann ikki møguleika at taka eina hond við, nú Jógvan Martin fyri fyrstu ferð skal senda landsliðið í undankappingardyst.

Ístaðin hevur landsliðsvenjarin tikið út Jónhard Frederiksberg úr Skála. Jónhard hevur verið mest sum fastur fúsur á landsliðnum seinastu 3 árini, men hesa ferð var hann ikki partur av upprunaliga hópinum. Týskvøldið spældi hann tó ein góðan dyst í Vági, og tí var tað hampiliga nærliggjandi, at hann var maðurin, sum varð innkallaður fyir Andrew.

**-mørk**

# VB/S-venjarin úr starvinum

**Stóri spurningurin undan týdningarmikla dystinum hjá VB/Sumba móti GÍ er, hvør verður venjari hjá liðnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tykist mest sum púrasta víst, at Ole Andersen er liðugur í VB/Sumba. Heimasíðan hjá felagnum skrivaði í gjárkvøldi, at tey vóru vitandi um, at leitað verður eftir nýggjum venjara. Og á heimasíðuni hjá Suðurrás verður staðfest, at venjarin er uppsagdur.

Enn eru almennu boðini um hetta tó ikki komin, og sjálvur vil Ole Andersen ikki gera nakrar sum helst viðmerkingar í málinum.

### Triði venjarin

Verður Ole Andersen sekkjaður, so er hann triði av venjarunum hjá teimum trimum botnliðunum, sum verður sagdur úr starvi, og so er spurningurin, hvørt hetta fer at hjálpa meira hjá VB/Sumba, enn tað hevur gjørt hjá ávíkavist B68 og ÍF, sum fyrr í ár hava sagt sínum venjarum – Jóannes Jakobsen og Petur Simonsen – úr starvi.

Í øllum førum hevur botnurin á talvuni alt árið verið mest sum púrasta javnur, og fleiri munnu helst vera á einum máli um, at hetta eins nógv skyldast tilfarinum, sum venjararnir hava at arbeiða við, heldur enn venjarunum sjálvum. Men tað er áður sæð, at eitt venjaraskifti kann sparka nýtt lív í ein hóp, og helst er tað hesi effektini, sum leitað verður eftir í Vági.

### Bjarni Johansen við róðrið

Hvør nýggi maðurin á beinkinum í Vági verður, er enn ikki greitt. Suðurrás metir tó, at fyrrverandi málverjin, Bjarni Johansen, er eitt gott boð. Og í øllum førum hevur hann higartil virkað sum venjari hjá næst besta liðnum hjá VB/Sumba. Ein annar maður, sum eisini verður roknaður sum gott boð, er Finn Johannesen, sum fyrr í ár hevur verið í samband við VB/Sumba. Og sum eisini hevur hjálpt Ole Andersen nakað.

Finn er í ferð við at nema sær venjaraútbúgving, og tá er tað eitt krav, at venjarin hevur lið at taka sær av. Og tað kann bera við sær, at Finn er ein maður, sum er rímiliga lættur at fáa til Vágs seinasta triðingin av kappingarárinum.

### Uppgávan

Fyri at koma aftur til uppgávuna, so er tað avgjørt ikki ein av lættara slagnum, sum VBS/umba hevur hesaferð. GÍ hevur kanska ikki havt so góðan byrð seinnu umførini, men týskvøldið fingu Petur Mohr og hansara menn javnleik í Gundadali móti B36. Spurningurin er so, hvussu gøtumenn eru fyri hesaferð. Seinast sótu bæði Magni Jarnskor og Sámal Joensen á beinkinum við skaða, og spurningurin er, hvørt teir verða tøkir hesaferð. Tað verða Niklas Niclassen og Áslakur R. Petersen heilt víst, eftir at teir sótu úti við leikbanni.

Hinvegin fingu bæði Hans Jørgen Djurhuus og Sverri Jacobsen reytt í Gundadali, og eru teir báðir tí leikbannaðir.

Hjá VB/Sumba er sterki verjuspælarin, Dmitri, nú aftur tøkur, eftir at hann hevur sitið tvey dystarbann av sær. Hinvegin er Evrard Ble ikki tøkur hesaferð, tí gulu kortini á kontini eru vorðin ov nógv í tali. Og so er týdningarmikið, at Hallur Dam Joensen verður tøkur aftur. Hann hevur drigist við skaða, men vónin er, at hann verður klárur nú leygardagin.